# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av landsynningi og regn, men seinnapartin støkkur hann vesturum til vestan og útsynning og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinni hækkar hann upp í norðan. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

# Seta minnisvarðan í stand



**Í Mykinesi stendur ein minnisvarði á sjónligum staði nakað væl frá bygdum øki. Tíðarinnar tonn er farin heldur illa við honum. Men nú eru pengar fingnir til at hjálpa upp á hann**

MINNI
*Edvard Joensen*

Nú 65 ár eru liðin, síðan minnisvarði varð reistur sjólætnum mykinesmonnum, verður hann umvældur og dagførdur, um so kann sigast.

Tað var í 1939, at varði varð reistur teimum mykinesmonnum til minnis, sum fórust undir Íslandi við sluppini Neptun í 1934.

Veður og vindur hava havt síni árin á varðan, sum nú er í slíkum standi, at neyðugt er at umvæla hann, skal hann verða standandi.

Men tungt er hjá fáum at lyfta slíkari byrðu, og í Mykinesi er fáment, so mykinesfólk hava líkasum ikki einsamøll hættað sær undir hesa uppgávuna.

Men nú hevur Lions Club í Vágum veitt teimum rættiliga góðan stuðul, sum ger, at farið verður undir at seta minnisvarðan í stand aftur.

Nýggjar plátur verða settar á varðan, har eisini nøvnini á teimum, sum farnir eru á sjónum, síðan hann varð reistur, eru við. Eisini er ætlanin at seta nøvnini á teimum, sum falnir eru í bjørgunum, á varðan.

Tað var Poul E. Petersen, sum tá var lærari í Mykinesi, sum í 1939 fekk litið upp í hendur at standa fyri at fáa varðan reistan. Og ungmannafelagið Súlan, sum tá var virkið, fekk síðan ábyrgdina av at halda hann viðlíka.

Hetta er so dottið niðurfyri, sum fólkið minkaði í Mykinesi. Men nú veðra munagóð tóð tøk tikin aftur, soleiðis at varðin aftur kann gerast viðiligt minni teirra, sum farnir eru.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | 18 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 25 |
| Róm | -- |
| Malorca | 18 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 15 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Ein hátrýstryggur, 1014 hPa. yvir Íslandi fer eystureftir og viknar. Eitt lágtrýst, 993 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikumorgunin.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/07 kl. 06⁰⁰–13/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/07 kl. 06⁰⁰–13/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 19,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli: Mánin næstur jørðini
5. juli: Jørðin longst frá sólini
9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 05.18 | 17.42 | 04.18 | 16.42 | 04.33 | 16.57 | 07.18 | 19.42 | 08.18 | 20.42 |
| 15. juli | 06.05 | 18.29 | 05.05 | 17.29 | 05.20 | 17.44 | 08.05 | 20.29 | 09.05 | 21.29 |
| 16. juli | 06.52 | 19.15 | 05.52 | 18.15 | 06.07 | 18.30 | 08.52 | 21.15 | 09.52 | 22.15 |
| 17. juli | 07.37 | 20.00 | 06.37 | 19.00 | 06.52 | 19.15 | 09.37 | 22.00 | 10.37 | 23.00 |
| 18. juli | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 07.37 | 20.00 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 03.33 | 15.57 | 02.33 | 14.57 | 05.33 | 17.57 | 06.33 | 18.57 | 05.03 | 17.27 | 06.18 | 18.42 |
| 15. juli | 04.20 | 16.44 | 03.20 | 15.44 | 06.20 | 18.44 | 07.20 | 19.44 | 05.50 | 18.14 | 07.05 | 19.29 |
| 16. juli | 05.07 | 17.30 | 04.07 | 16.30 | 07.07 | 19.30 | 08.07 | 20.30 | 06.37 | 19.00 | 07.52 | 20.15 |
| 17. juli | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 07.22 | 19.45 | 08.37 | 21.00 |
| 18. juli | 06.37 | 19.00 | 05.37 | 18.00 | 08.37 | 21.00 | 09.37 | 22.00 | 08.07 | 20.30 | 09.22 | 21.45 |

5 707265 100036 >